# Føroya krønika útkomin sum teknirøð




**Fyrstu 60 milliónir árini við serligum denti á tíðarskeiðið, tá ið menn fyrst nomu land her í oyggjunum og royndu at sættast sum frægast. Soleiðis stendur á tittulblaðnum til forkunnugu Føroya krøniku eftir Markus Jiménéz**

BØKUR
*Ingi Rasmussen*

Fyri sløkum mánað síðan hevði Markos Jiménéz listaframsýning í Smiðjuni í Lítluvík. Samstundis bleiv teknirøðin, Føroya krønika, løgd fram fyri fjølmiðlum og øðrum áhugaðum. Orsakað av verkfallinum, ið tá var, strandaði bókin í Danmark og vóru bert fá eintøk at vísa fram. Nú er bókin komin og fæst til keyps í bókahandlunum kring landið.

Í formælinum sigur teknarin, at teknirøðin fyrst og fremst er eitt uppskot – ein persónlig, ótilgjørd tulking og kronologisk endursøgn av tí, sum kanska hendi í fornari tíð við serligum denti á tíðarskeiðið, tá ið menn fyrst nomu land og royndu at sættast sum frægast.

## 60 milliónir ár

Upprunaliga hugskotið til teknirøðina var at gera eina stuttliga og keipukenda lýsing av Føroya søgu og tí, sum tá var. Líka frá landið varð til og til dagin í dag.

– Óvitandi um, hvussu umfatandi arbeiði kundi gerast, í øllum førum um tú fert í smálutirnar, fór eg fúsur og ónervaður til verka. Ókey. Í hesum hefti havi eg roynt at lýst fyrstu 60 milliónir árini upp til umleið ár 1000, tá ið villu víkingarnir settu síni ógloymandi spor í hesum landinum. Ikki so galið, tá ið eg sjálvur skal siga tað, sigur rithøvundurin sjálvur um bókina.

## Kvæði og søga

Tað snýr seg um søgu og mentanararv, ið er farandi og komandi, sálina, seyðin og øll hini, sum búðu her, og næstu grannarnar. Teknirøðin er ein roynd at sameina søguligan veruleika við mytologisku, fantastisku og løgnu hendingarnar, sum tú kanst hóma í Føroyingasøgu.

Í bókini eru stuttligar og keipukendar tekningar. Innihaldið fevnir m.a. um uppruna, landnám, norrøna búseting og fleiri kvæði og sagnir eru við. Brestis kvæði, sum Mikkjal á Ryggi yrkti, og Sigmunds kvæði yngra, sum Jens Chr. Djurhuus yrkti, eru endurgivin í fullari longd.

– Stuttligu myndirnar í bókini gera, at bókin heilt vist fangar áhugan hjá størri børnum, ungum og vaksnum við. Og bókin kann heilt vist eisini vera eitt íkast til søgu- og kvæðaundirvísingina í skúlunum, sigur Bókadeild Føroya Lærarafelags í tíðindaskrivi.

Føroya krønika er 62 síður, innbundin í stíva permu. Hon kostar 150 krónur. Dánial Hoydal týddi tekstin til føroyskt.

# Gávukistil við smáum bíbliusøgum

Bókadeild Føroya Lærarafelags hevur givið út ein hugtakandi gávukistil við smáum bíbliusøgum.

Gávukistilin inniheldur 10 smáar, vakurt myndprýddar bøkur. Jenny Fry og Ruth Hooper endursøgdu søgurnar. Amy Tausen týddi úr enskum.

Søgurnar eru helst millum best dámdu og mest lisnu søgurnar í Gamla testamenti. Í kistlinum finnur tú søguna um Skapanina, Nóa ark, Jósef, Móses og tornarunnin, Jónas, Samson, David og Goliat, Salomon, Dánjal í leyvuhellinum og søguna um, tá ið Reyðahavið skilti seg.

Søgurnar eru lýstar og myndprýddar yndisliga og hugtakandi og eru serliga ætlaðar at lesa fyri smábørnum. Í gávukistlinum eru 10 bøkur við 28 síðum í hvørjari. Gávukistilin kostar 150 krónur.







*Bíðirøðirnar vóru langar allastaðni, tá fimta bókin um Harry Potter kom út kring allan heim*

*Mynd: Reuter*

# Enn ein magisk bók í pottinum

**Á ársins longsta degi kom tann fimta bókin í røðini um Harry Potter eftir J.K. Rowling út. Og harvið er gandurin aftur slepturleysur. Bókin hevur aftur sligið met, og ummælarar hava givið seg yvir**

POTTER-FEPUR
*Ingi Rasmussen*

Bókin »Harry Potter and the Order of the Phoenix« setti longu sølumet fyrsta vikuskiftið, og eingin í bókaverðini minnist nakað líknandi. Bara í Bretlandi bleiv bókin seld í 1,7 milliónum eintøkum fyrstu 24 tímarnar. Bókahandilin á internetinum, Amazon.com, seldi yvir eina millión eintøk fyrsta dagin, og allastaðni varð bókin skrædd av hillini.

Sostatt tekur fimta bókin við, har tær fýra fyrstu sleptu, tí tær hava tilsamans selt umleið 192 milliónir bøkur um allan heim á minst 55 málum í 200 londum.

Góða undirtøkan hoyrir kanska gandaverðini til, og uttan at siga ov nógv, so eydnast tað aftur hesaferð Harry at sleppa væl burtur úr stríðnum ímóti myrkursins kreftum á Hogwarts, skúlanum fyri gandakynstur og galdralist.

## 15 og forelskaður

Í fimtu bókini er Harry Potter 15 ára gamal og gongur í fimta flokki í Hogwarts. Hann hevur tvey ár eftir av skúlagongdini, áðrenn hann fær tað gandakenda studentsprógvið. Men Harry er eingin nørdur og hevur sum vanligt ríkiligt annað enn skúlagongdina at hugsa um.

Tá enn ein keðilig summarferia hjá Dudley og teimum í Privet-gøtuni nærkast endanum, verður Harry álopin av óndum verum. Hann megnar tó at sleppa undan við nøkrum væl valdum gandaorðum og gandastavinum. Tað førir við sær, at hann verður stevndur fyri Gandamálaráðið, tí hann hevur brúkt gand í muglaraverðini. Frammanundan verður hann kunnaður um Føniksskipanina, ið er eitt slag av fregnartænastu, ið heldur eyga við tí ónda Voldemort, sum hevur ligið Harry eftir lívinum, síðan hann varð føddur.

Okkurt bendir á, at Voldemort aftur er farin at gera um seg, og tí verður lagt upp til enn eina styrkiroynd millum góðar og óndar kreftir.

Hesaferð hevur Harry eisini nýggjar kreftir í sær sjálvum at stríðast ímóti, tí hann er um at gerast vaksin. Tað snýr seg eisini um pubertet, tann fyrsta kærleikan og um at stýra sínum kenslum.

## Eingin skriviótti

Nógv hevur verið tosað um bókina, sum hevur verið ávegis, og gitt hevur verið, at bókin varð seinkað, tí J.K. Rowling, sum so nógvar mytur longu eru gjørdar um, hevði fingið skriviótta

Stórt trýst hevur verið lagt á Rowlings, tí tað er næstan vónleyst at liva upp til stóru krøvini, sum børn, ung og vaksin um allan heim leggja á hana. Tað sær út til, at hon hevur vunnið á óttanum. Í øllum førum hava ummælarar nógvar rósir til hennara fimtu bók.

Chicago Tribune skrivar, at fimta bókin er nógv tann besta, sum higartil er komin út um Harry Potter. Associated Press samanber góðskuna í bókini við eina plátu frá The Beatles, sum yvirlivir í nógv ártíggju. VG í Noregi sigur, at fimta bókin gevur okkum uppafturmeira av øllum tí, sum Rowling higartil hevur givið. Og BBC hevur sagt, at bókin kann fanga øll – ung sum gomul.

So er bara eftir at bíða eftir føroysku týðingini, sum Bergur Rasmussen er settur at gera.



# Um svidnu Pussifelluna og øvuta kúvingin

**Upprunaføroysk barnabók, sum tekur útgangsstøði í fólkum við tilknýti til Føroya fólkaháskúla, er komin út. Guðrun Gaard hevur skrivað**

BØKUR
*Ingi Rasmussen*




Millum nógvu bøkurnar, sum Bókadeild Føroya Lærarafelag júst hevur givið út, er ein upprunaføroysk barnabók. Hon hevur heldur sjáldsama tittulin »Um svidnu Pussifelluna og øvuta kúvingin«, og tað er Guðrun Gaard, ið hevur skrivað.

Søgan er um smágentuna Guðrun, sum er forvitin og droymandi. Á veg heim ígjøgnum gøturnar í Havn, fara Oscar og Guðrun inn í Reyðukiosk at keypa tað longsta bommið, sum er at fáa. Meðan Oscar tosar við eina konu, stendur knappliga ein lítil maður framman fyri Guðruni. Maðurin er púra øvutur. Við honum fer Guðrun í øvutu verð, har hon leypir niður í eitt gandaskrín, sum er sett við skínandi kúvingi.

Bókin byggir partvíst á veruligar persónar, sum eru eyðkendir fyri tey, sum minnast umhvørvi við Háskúlan. Millum annað er ein av stovnarunum, Rasmus Rasmussen, sum er abbi Guðruna, skemtiliga teknaður av Bárði Oskarsyni.

Guðrun Gaard er cand. mag í norðurlendskum bókmentum og starvast sum lærari í Hoydølum. Hon hevur áður skrivað og teknað tríggjar bøkur um vættraparið Snøkil og Snáku. Eisini hevur hon skrivað plantubókina, Brobber.

Bárður Oskarsson, sum hevur gingið á Skolen for Billedkunst, hevur myndprýtt bókina. Hann hevur myndprýtt barnasøgur síðan 1986, seinast Margreta og mjólkin, sum Bókadeildin gav út í fjør.

»Um svidnu Pussifelluna og øvuta kúvingin« er 34 síður innbundin og kostar 95 krónur í bókabúðunum. Hon hóskar væl til tey 3 til 7 ára gomlu.

# Seinasta bókin um jødagenturnar

»Opið hav« er fjórða og seinasta bókin í røðini um jødagenturnar, Steffi og Nell, sum foreldrini sendu til Svøríkis, eftir at nasistarnir vóru farnir at gera seg inn á jødarnar í Wien.

Endiliga kemur várið 1945, og kríggið endar. Steffi fær studentsprógv og noyðist nú at velja, hvar hon ætlar sær at vera. Skal hon vera verandi í Svøríki saman við lítlusystrini, skal hon fara til Wien ella kanska til Amerika at leita eftir næstringum?

Valið gerst ikki lættari hjá Steffi, tá ið Sven, hennara fyrsti og stóri kærleiki, kemur aftur. Kenslur, hon helt vera deyðar, vakna upp aftur av nýggjum.

Hjá Nelli er valið nógv lættari. Hon vil helst vera verandi í Svøríki hjá fosturforeldrum sínum. Men hvat siga tey? Vilja tey hava hana har? Kanska eigur hon at vera saman við Steffi og pápanum – um hann er á lívi.

Opið hav er 218 síður, heft og kostar 140 krónur.

